# MASKIN MEISTARIN

Nr. 1 / Apríl 2017





Rannsóknarskip



Aðalfundur



Aspirantskipan

Jørgin Pauli Johannessen:

## FRÁ APOTEKI TIL MASKINURNAR

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Páll Hansen, ábyrgd
Jóan Petur Patursson

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda MASKIN-MEISTARAN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MASKINMEISTARANUM, tá keldan verður upplýst. MASKINMEISTARIN kann heintast í PDF á heimasíðuni hjá felagnum: www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
*Jørgin Pauli Johannessen:*
Grækaris Djurhuus Magnussen
*Leon Smith:*
Øssur Winthereig
*Aðalfundur:*
Ingolf S. Olsen
*Aspirantskipan:*
Zahcarias Hammer

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting, prent og liðugtgerð**
Estra 478500

Upplag: 700



# Maskinmeistarin – nýtt blað

Kæru limir og lesarar annars. Tú situr nú við fyrstu útgávuni av nýggja felagsblaðnum. Navnið er Maskinmeistarin, og blaðið kemur í staðin fyri Mið og Magn, sum nú er farið í søguna.

Mið og Magn varð givið út saman við Føroya Skipara- og Navigatørfelag, men tað felagið gjørdi í vetur av at fara burtur frá pappírsútgávu og bert bera tíðindi á netinum. Maskinmeistarafelagið sær hinvegin stórt virði í at hava eitt veruligt blað, sum limirnir kunnu hava í hondini, og sum ber journalistiskt viðgjørd tíðindi.

Blaðsamstarvið endaði tískil 1. apríl, og Maskinmeistarafelagið gevur einsamalt nýggja blaðið Maskinmeistarin út.

Í sniði verður Maskinmeistarin nakað øðrvísi enn Mið og Magn, og innihaldsliga verða tað nú burtur av tíðindi og annað tilfar innan maskinmeistarafakið og fakfelagsøkið hjá Maskinmeistarafelagnum, sum fara at fylla blaðið.

Fríyrkisfelagið PRESS, sum eisini skrivaði og greiddi til prentingar Mið og Magn, fer at taka sær av útgávuni av Maskinmeistaranum, og ætlandi verða fýra bløð um árið – í ár verða tey tó bert trý, tí seinasta útgávan av Mið og Magn fevndi um fyrsta ársfjórðingin í ár.



**Páll Hansen**
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*

## Innihald

Havrannsóknarskip
– Strong krøv .................. **s. 3**
Maskinsmeistari
í spennandi starvi ........... **s. 7**
Aðalfundur:
Friðarligt í fiskiflotanum .. **s. 11**
Aðalfundur:
Ymiskar meiningar .......... **s. 16**
Aðalfundur:
Hans Ingvard nýggjur
nevndarlimur................... **s. 17**
Aðalfundur:
Limagjaldið lækkað ........ **s. 18**
Aðalfundur:
Fyrsta kvinna á fundi ...... **s. 20**
19 maskinistar
fingu prógv ..................... **s. 21**
Nýggj aspirantskipan...... **s. 23**
Føðingardagar ................ **s. 26**
Maskinmeistarafelagið:
Tíðindi ............................. **s. 27**





*Framhald á næstu síðu >>*

*Nýggja havrannsóknarskipið:*

# Strong krøv til óljóð

**Eitt havrannsóknarskip er eitt flótandi mátitól, sum eisini skal fiska. Nýggja havrannsóknarskipið skal vera á sama støði, sum onnur havrannsóknarskip. Eitt nú eru strong krøv sett til larm. Skipið skal gera fiskiroyndir og umhvørvisroyndir, og tá skal skipið vera so ljóðleyst, sum til ber og lúka klassingarkrøv sum havrannsóknarskip. Nýggja havrannsóknarskipið verður liðugt í 2020**

**TEKSTUR OG MYNDIR:**
ØSSUR WINTHEREIG
ossur@press.fo

Eftir ætlanir í 10 ár fer MEST í næstum at smíða nýtt havrannsóknarskip. Eitt skip við somu uppgávum sum Magnus Heinason, men sum á øllum økjum er betri hóskandi. Bæði sum skip og sum arbeiðspláss hjá manning og vísindafólki.

Leon Smith er tekniskur leiðari á Havstovuni og hevur staðið fyri, hvussu arbeiðið umborð skal skipast, og hvussu arbeiðsgongdirnar skulu vera.



*Leon Smith, tekniskur leiðari á Havstovuni, við modellið av nýggja havrannsóknarskipinum*

– Tøknin er sjálvandi ment nógv hesi árini, men nógvar arbeiðsgongdir umborð á Magnusi Heinason eru so mikið góðar, at tær taka vit við umborð á nýggja skipið. Serliga

Framhald á næstu síðu >>

arbeiðsgongdirnar á dekkinum og í fabrikkini, har mátingarnar av fiskinum verða gjørdar, sigur Leon Smith.

– Vit hava verið og hugt eftir nógvum havrannsóknarskipum, men eg havi ikki sæð arbeiðsgongdirnar betri enn tær umborð á Magnusi Heinason, sigur Leon Smith.

## Krøv til óljóð

Eitt tað týdningarmesta, tá nýggja skipið skuldi teknast, vóru krøvini til óljóð ella larmin. ICES hevur ein standard – ICES 209 – um hvussu nógv havrannsóknarskip mugu larma – hvussu nógv óljóð fer út í sjógvin.

– Vit hava arbeitt fyri at koma undir ICES 209-krøvini. Fyri nýggja skipið merkir tað, at tað verður klassað sum Silent-Research (Silent-R) skip, greiðir Leon Smith frá.

Ein partur av arbeiðinum hjá einum havrannsóknarskipi er at gera akustiskar kanningar, og ein annar partur er at fiska, gera yvirlitstrolingar og líknandi.

Krøvini eru, at larmurin skal liggja undir einum ávísum marki, tá skipið siglir marchferð, sum er 11 míl. Tá leitað verður við ekkoloddi, er tað so, at jú minni skipið larmar, jú betri signal fært tú aftur. Samanumtikið fæst nógv betur data burturúr, um skipið er so at siga ljóðleyst.

## Magnus larmar illa

Ein av atfinningunum móti Magnusi Heinason er, at hann larmar illa.



*Endaligu tekningarnar skulu nú gerast lidnar í samstarvi við MEST*

– Ja, vit vita, at Magnus larmar illa, og at hann fiskar hareftir, sigur Leon Smith. Men kortini halda vit, at hann riggar sum rannsóknarskip, tí hann fiskar javnt illa, so á tann hátt passar tað.

Larmar skipið ov illa, tá fiskað verður, so er tað sannlíkt, at tað styggir fiskin.

Leon sjálvur plagar at vera einar tveir túrar um árið við Magnusi Heinason, tá teir gera akustiskar mátingar – í ár skal hann ein sildatúr og ein makreltúr.

– Tað eru tekniskt tungir túrar, tá vit mátað akustikk. Ekkolodd verður brúkt at máta fisk, og tá skal hvørt einasta ping skrásetast og gerast um til nøgd og fiskasløg. Har er øgiliga nógv talviðgerð, sum so skal enda við einum tali, sum sigur, hvussu nógv tons av fiski eru har á leiðini, sigur Leon Smith.

## Eitt flótandi mátitól

Eitt havrannsóknarskip er eitt mátitól, sum tú setur út á sjógv, og tá sigur tað seg næstan sjálvt, at málið er at gera eitt so ljóðleyst skip, sum til ber.

Tað eru tríggjar høvuðskeldur til óljóð á einum skipi sum nýggja havrannsóknarskipinum. Tær eru skrúvan, framdriftsmotorurin, sum er ein elektromotorur, og so diselmotorarnir, sum gera streymin. Framdriftsmotorurin er ein elektromotorur, sum er 2400 kW.

Fyrsta avbjóðingin er at gera eina skrúvu við serligum atliti til ikki at larma. Har ræður um at minka um kavitasjónina, tí tá luftbløðrurnar frá skúvunum bresta, larmar tað illa. Skrúvan er 3,6 metrar í tvørmát, hon melur seint og hevur onga giring.

Avbjóðingin við elektromotorinum eru ristingarnar, sum flyta seg út í skrokkin, og sum verða til larm í sjónum. Elektromotorurin er ein vekslistreymsmotorur, sum ikki hava verið so vanligir til slíkt brúk.

– Vit eru sera glaðir fyri, at vit fáa ein vekslistreymsmotor, tí viðlíkahaldið er so nógv minni enn við ein javnstreymsmotori.

Talan er um ein serligan motor, sum verður gjørdur til skipið, sigur Leon Smith.

Generatoranleggið er 2998 kW til samans. Ein vanligur diselgeneratorur verður hongdur upp á gummipútur og settur á eitt fundament. Generatorarnir umborð á nýggja skipinum – enn er ikki avgjørt um teir verða tveir ella tríggir – verða dupultupphongdir – sum skuldi tikið nógvar ristingar, ið annars høvdu endað úti í skrokkinum. Maskinrúmið sjálvt verður eisini eykaisolerað fyri at minka um akkustiska larmin.

– Tað sum fylgir við, tá krøvini til óljóð og larm eru so strong, er, at tú eisini fært eitt sera friðarligt skip at arbeiða umborð – tað fært tú fyri einki, um eg so má siga, sigur Leon Smith.

## Skip til føroyskan tørv

Umframt kravið um so ljóðleyst skip, sum gjørligt, so var longu frá fyrsta degi hugsað um at fáa eitt skip til føroyska tørvin og ikki minst til ta fíggjarligu orku, sum er tøk.

– Vit hava sett okkum fyri, at nýggja skipið skal ikki vera dýrari at reka enn Magnus Heinason. Tað ber ikki til, at raskturin blívur dupult so dýrur, tað var eisini eitt krav. Serliga var tað táverandi stjórin Hjalti í Jákupsstovu, sum legði stóran dent á tað, sigur Leon Smith. Um vit fíngu eitt skip, sum var dupult so dýrt at reka, so høvdu vit bara verið helvtina av tíðini úti.

> ❞ Nýggja havrannsóknarskipið skal hava øksastevni ❝

## DP-skipan

Øll útgerð umborð er elektrisk, eitt nú asimuttur og trolspøl. Frá fyrstan tíð løgdu teir seg eftir at hava eina DP-skipan (Dynamic Positioning). DP-skipanin stýrir róðri, skrúvu og asimutti og heldur skipinum á einari fastari posisjón. Tað er ógjørligt við Magnusi Heinason, tí streymur og vindur flyta skipið beinanvegin. Og Magnus hevur bara ein skrúvu at manerera við.

– Um ein posisjón er vald, so skal tað vera hon og ikki ein 100 metrar við síðuna av.

Tá royndarboringarnar eftir olju vóru undir Føroyum, vóru teir á Magnusi Heinason ofta spurdir um at gera ymsar umhvørviskanningar fyri oljufeløgini, men tá teir hoyrdu, at føroyska skipið ikki hevði DP-skipan, so valdu feløgini altíð okkurt annað skip.

Nýggja havrannsóknarskipið skal hava ein asimutt, sum er 900 kW. Hann situr nakað framman fyri miðjuna á skipinum. Asimutturin verður stungin niður í sjógvin, og tá hann er uppi, kann hann brúkast sum síðuskrúva. Harafturat er ein skrúva og eitt róður, og er tað nóg mikið til at fáa DP-skipanina at rigga fult.

## Fiskarí og umhvørvi

Nýggja skipið er býtt upp í tveir høvuðspartar. Ein fiskarípart til fiskikanningar og ein umhvørvispart.

– Fiskaríparturin er bygdur upp eftir teimum royndum, sum føroyingar hava. Tað, sum fiskimenn vita, er gott at hava





*Nýggja havrannsóknarskipið hevur hesi mát: Longd, 54,4 m, breidd, 13,6 m, service ferð, 11 míl, mesta ferð, 14 míl, mesta manning, 25*

av trumlum, spølum og aðrari útgerð, sigur Leon Smith.

Undir troldekkinum er eitt dekk við tveimum linjum, har fiskurin verður bløðgaður, mátaður, vigaður, og aðrar kanningar verða gjørdar. Allar mátingar verða skrásettar elektroniskt – stødd, vekt, kyn og so víðari.

Tá fiskurin er kruvdur, fer hann í lastina, sum er eini 40 tons. Ætlanin er, at einki skal tveitast aftur í havið, men garnar og annað verða koyrd í ein ensilasjutanga.

Hin arbeiðsparturin er umhvørviskanningar, har royndir vera gjørdar av eitt nú hita, saltinnihaldi, streymviðurskiftum, og tann parturin av arbeiðinum hevur einki við fiskiskap at gera. Umhvørviskanningar eru ein stórur partur av arbeiðinum hjá Havstovuni. Túrarnir eru vanliga býttir upp í fiskitúrar og umhvørvistúrar.

Havstovan hevur sum høvuðsuppgávu at ráðgeva mynduguleikunum um fiskarí, og umhvørviskanningarnar styðja undir ta ráðgevingina.

### Øksastevni

– Skrokkurin er konstrueraður við øksastevni, og tað er vælegnað til okkara farvatn, tí tað er altíð óróligt í sjónum. Vit vænta okkum nógv av hesi konstruksjónini, sigur Leon Smith. Tær modelroyndir, vit hava gjørt, vísa, at hann ber seg væl, serliga tá man siglir ímóti.

Ekkoloddini kunnu senkast niður í sjógvin, so tey stinga einar tveir metrar, so signalini ikki órógvast av luftbløðrunum, sum altíð eru ovarlaga í sjónum – serliga um veðrið er eitt sindur ófantaligt. Ekkoloddini eru úr 18kHz upp í 200 khz.

Tað, sum fer at lætta nógv um arbeiðið, er, at nýggja skipið hevur ein sjey tons krana at seta útgerð út og taka uppaftur við.

Á dekkinum er eisini pláss fyri trimum 20-fóts bingjum, tá serligar uppgávur skulu loysast. Talan kann verða um at skjóta seismikk, sum krevur nógva útgerð, ið ikki er umborð vanliga.

Eitt krav til skipið er, at tað kann sigla alla staðni í verðini, har føroyingar hava áhugamál, tí lýkur tað eisini strangastu útlátsmál – TIER-III.

### Betri umstøður

Umfram tøkniligar fyrimunir, so skuldi eisini verið hugaligari hjá manningini í gerandisdegnum.

Manningin hevur eittmanskømur, meðan tey, sum koma úr landi, hava tveymanskømur. Í alt eru 19 kømur, og til samans kunnu 25 fólk vera við nýggja skipinum.





*Framhald á næstu síðu >>*

# Maskinmeistari í spennandi starvi hjá J&K

**Hann er útbúgvin farmakonomur, og arbeiddi í nógv ár á Tjaldursapotekinum í Havn. Seinni tók Jørgin Pauli Johannessen serliga maskinmeistaraútbúgving í Esbjerg**

**TEKSTUR OG MYNDIR:**
GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN
grakaris@press.fo



*Maskinmeistarin og farmakonomurin, Jørgin Pauli Johannessen, trívist væl í starvi sínum hjá J&K Petersen*

Tíðliga hendan seinnapartin situr hann á lítlu skrivstovu síni við síðuna av verkstaðnum í virkisbygninginum á Hjalla. Ein rútur er millum skrivstovuna og verkstaðið, har millum annað tveir nýggir smiðjumenn arbeiða. Annar av nýggju smiðjumonnunum er útbúgvin maskinmeistari, og úti á Glyvursnesi, har J&K stendur fyri nýggju havnarútbyggingini hjá Tórshavnar Havn, arbeiðir eisini ein maskinmeistari. Har skulu teir skjótt seta ein maskinmeistara í starv aftrat, tí maskinparkin á Glyvursnesi er so mikið stór. Sjálvur er Jørgin Pauli Johannessen eisini útbúgvin maskinmeistari.

Umvegis rútin millum skrivstovuna og verkstaðið er Jørgin Pauli Johannessen soleiðis óbeinleiðis við í arbeiðinum á verkstaðnum.

Hann tosar í telefon, tá eg komi innar, og eg fái beinanvegin fatan av, at her er nógv ferð á arbeiðinum.

Framhald á næstu síðu >>



*Her stendur Jørgin Pauli Johannessen á nýggjastu og higartil størstu gummigeituni hjá J&K. Hon er spildurnýggj, júst komin til landið*

Fyrrverandi farmakonomurin á Tjaldursapotekinum arbeiðir í dag sum samskipari og verkstaðsleiðari hjá J&K Petersen. Og í hesum starvinum trívist hann avbera væl. Her eru nógvir bóltar í luftini samstundis, og avbjóðingin er at fáa allar bóltarnar at lenda á røttum stað og til tíðina.

– Mín uppgáva er at skipa fyri øllum viðlíkahaldi av maskinum, og at skráseta allar feilmeldingar, sum koma inn. Í tí liggur, at tá ein maskina hevur fingið eitt brek av onkrum slag, skal eg beinanvegin taka støðu til, hvat skal gerast, og hvør skal gera tað. Í hesi vinnuni er ógvuliga umráðandi, at ein maskina kemur aftur at rigga sum skjótast, tá ólag hevur verið, tí tær arbeiða í einum toymi, og tá brek er við einari maskinu, kann tað forpurra alt møguligt annað eisini.

– Tú skalt eisini minnast, at flestu maskinurnar koyra í „døgndrift“, og viðlíkahaldseftirlit skal gerast fyri hvørjar 500 tímar, so her er ein øðilig rúgva av arbeiði, sum skal gerast, sigur Jørgin Pauli Johannessen.

Bara hendan tíman, vit higartil hava prátað, hevur hann fingið fleiri teldupostar, sum allir skulu svarast.

J&K Petersen er í dag ein stór fyritøka eftir føroyskum viðurskiftum, og felagið hevur einar 200 dumparar, bilar og maskinur av ymsum slag, sum allar skulu haldast við líka.

## Hevur eisini goymsluna

Jørgin Pauli Johannessen hevur eisini ábyrgdina av eykalutagoymsluni. Tá tað er tørvur á eykalutum av ymsum slag, og eykaluturin ikki er á goymslu, er tað Jørgin, sum saman við goymslumanninum bíleggur hann og syrgir fyri, at eykaluturin kemur til Føroya sum skjótast.

– Tað er eisini mangan neyðugt hjá mær at fara út á feltið at kanna trupulleikar, sum kunnu standast, og har finna út av, hvussu teir verða loystir skjótast gjørligt. So eg eri eisini nógv úti av skrivstovuni. Tað er nógv koyring, sigur hann.

Hann leggur dent á, at hann eisini fær hjálp uttanífrá. Til dømis hevur ein maður, sum Leo Clothier – ein ógvuliga royndur maður við egnari fyritøku – mangan verið honum ein holl hjálp í ivamálum.



– Leo Clothier er ein maður, sum hevur givið mær nógva og týdningarmikla vitan hesi árini hjá J&K Petersen, sigur Jørgin Pauli Johannessen.

## HTU-leiðari

Arbeiðsøkið hjá Jørgini er ógvuliga fjølbroytt. Hann er eisini settur sum HTU-leiðari, tað er, at hann hevur ábyrgdina av heilsu, trygd og umhvørvi. Hann hevur ábyrgdina av at skipa trygdina úti á øllum arbeiðsplássum hjá felagnum.

– Her er talan um arbeiðsbólkar, trygdarnevnd og alt, sum hoyrir til hetta økið. Hetta er næstan eitt starv í sær sjálvum, so her eri eg noyddur at veita ymiskt arbeiði út til plássformenninar ella arbeiðsleiðarar. Til dømis gera vit eina fóðurgoymslu fyri Havsbrún í Fuglafirði í løtuni, og har havi eg so lutað heilsu- og trygdararbeiðið út. Men eg fari eisini á ófráboðaðar vitjanir á ymsu arbeiðsplássini av og á og kanni, um alt er, sum tað skal vera, sigur hann.

Ímeðan vit tosa, ringir telefonin við kortum millumbilum. Her eru spurningar um alt millum himmal og jørð, sum Jørgin roynir at svara – og trupulleikar at loysa. Hann sær út at hava gott yvirlit.

> ”Úti á Glyvursnesi gongur tað fyri seg, nú Tórshavnar havn verður útbygd“

## Havnarmaður

Jørgin Pauli Johannessen er føddur og uppvaksin í Havn. Hann varð borin í heim 18. september í 1962. Hann er giftur við Christinu Johannessen, ið er sosialráðgevi. Tey hava tríggjar døtur: Miu, sum er 21 ára gomul, Sólju, sum er 17 ára gomul, og Vár, sum er 11 ára gomul.

Hann gekk í barnaskúla og í framhaldsdeild í Kommunuskúlanum í Havn. Seinni gekk hann eitt ár á Háskúlanum. Hann tók HF-prógv í Hoydølum í 1982 og umhugsaði tá at fara at lesa til farmaseut. Í hesum sambandi fór hann niður at útbúgva seg meira í alisfrøði og støddfrøði, men útbúgvingin til farmaseut varð kortini av ongum. Seinni fór hann í læru sum farmakonomur á Tjaldurs Apotekinum.

Jørgin var liðugur sum farmakonomur í 1986, og arbeiddi á Tjaldurs Apotekinum heilt fram til 2007. Tá fór hann at ivast í, um arbeiðið sum farmakonomur var tað, hann vildi hava sum lívsstarv. Ikki tí, hann hevði trivist væl á Apotekinum.

Í frítíðini hevur hann fingist nógv við sang, og hann hevur í nógv ár sungið við Tórshavnar Manskóri.

– Men í 2007 gjørdu konan og eg av at flyta niður til Danmarkar, har konan fór at lesa til sosialráðgeva.

Og tá gjørdi Jørgin av at fara at lesa til maskinmeistara í Esbjerg. Hetta var ein eitt sindur øðrvísi maskinmeistaraútbúgving, sum serliga vendi sær móti offshore-vinnuni. Heitið á útbúgvingini, sum minnir nógv um útbúgvingina, sum Vinnu-

háskúlin í dag hevur, varð rópt Teknisk Manager Offshore (AK).

Tá hann var liðugur við útbúgvingina, fekk hann tíðaravmarkað starv á Faroe Pelagic í Kollafirði. Seinni fór hann aftur í starv á Tjaldurs Apotekinum í umleið tvey ár, til hann í 2013 varð settur í starv hjá J&K Petersen. Og her hevur hann verið síðani.

### Langir dagar

Dagarnir hjá Jørgini Paula Johannessen kunnu vera drúgvir. Hann roynir at møta klokkan átta um morgunin, men telefonin byrjar mangan at kima langt áðrenn tað. Ofta eru tað trupulleikar av ymsum slag, ið skulu loysast. Hann møtir so nakað eftir klokkan átta, og so koyrir tað við fullari ferð allan dagin.

Klokkan nærkast nú trý hendan seinnapartin. Vit hava gjørt samrøðuna, meðan telefonin hevur ringt áhaldandi. Hann hevur verið úti og heilsa upp á maskinsmiðin á verkstaðnum, og nú hevur hann ørindi út á Glyvursnes, har J&K Petersen tekur sær av havnarútbygginini. Úti á Glyvursnesi eru eisini nógvar og stórar maskinur og bilar, so her fer eisini ein partur av degnum hjá Jørgini. Tveir grótbátar sigla við gróti frá Glyvursnesi, og teir báðar bátarnar eigur J&K Petersen eisini.

Eg fari við honum út á Glyvursnes. Á veg út gera vit eitt legg út á Molan. Har stendur higartil størsta gummigeitin hjá J&K Petersen, júst komin í land. Jørgin Pauli Johannessen ætlar at síggja nýggju gummigeitina. Vit koyra av Hjalla, har skrivstovan hjá Jørgini er, oman móti býnum og snara at enda út á Molan. Her er ein rúgva av bingjum, og tað gongur ein løta, áðrenn vit finna gummigeitina. Men har stendur hon so bærilig. Ein øðilig stødd – og megin man vera hareftir. Jørgin klintrar upp á gravkúnna, og tað er næstan, sum hann hvørvur uppi á henni. Jú, tað er greitt, at hann er errin av sínum arbeiðsplássi – og nýggju gummigeitini.

### Á Glyvursnesi

Av Molanum gongur leiðin út á Glyvursnes, har velduga arbeiðið við havnarútbyggingini fer fram. Tað er hiðani, grótið til nýggju havnina kemur. Vegurin er eitt sindur knortlutur út eftir, og fer ikki væl við bilunum. Komnir heilt út á Glyvursnes, síggja vit arbeiðsvegin oman á atløgubryggjuna, har grótið verður tikið umborð á grótbátarnar. Her úti gongur tað fyri seg. Á vegnum oman móti grótbátunum koyra dumparar. Uppi í grótbrotinum sær tú eisini dumparar, borivognar, gravimaskinur av ymsum slag og aðrar maskinur. Inni í einari gamlari høll stendur ein trumla. Uttanfyri eru teir í ferð við at vaska eina maskinu. Viðlíkahaldið, sum Jørgin er komin at eygleiða í dag, og sum hann hevur ábyrgdina av, er rættiliga týdningarmikið. Jørgin hevur eisini ábyrgdina av verkstaðnum her úti á Glyvursnesi.

Telefonin hjá honum ringir aftur. Ein av manningini á øðrum grótbátinum ætlar at sleppa til Havnar onkursvegna. Tað gongur ein lítil løta, so hevur Jørgin eisini loyst tað málið.

– Ja, málini er nógv og rættiliga ymisk, sum skulu loysast, flennir hann.

Hann heldur maskinmeistarar hava ein rættiliga góðan møguleika at fáa arbeiði í framtíðini. Tí hóast minking hevur verið í offshore-vinnuni, so hevur tað ikki gingið nakað serligt út yvir maskinmeistarar. Samstundis vaksa aðrar vinnur. Og maskinmeistaraútbúgvingin gevur so fjølbroyttar møguleikar.

– Sambært eini formansfrágreiðing hjá formanninum í danska Maskinmeistarafelagnum hevur undirskotið upp á útbúnar maskinmeistarar í Danmark verið fleiri hundrað um árið. Samstundis hevur vinnulívið funnið út av, at ein maskinmeistari er góð arbeiðsmegi. Eftirspurningurin eftir maskinmeistarum veksur allastaðni, eisini heima í Føroyum.

– Altso, bara her hjá okkum hava vit júst sett ein maskinmeistara í starv, og ein skal setast í starv aftrat. Nei, maskinmeistarar hava eina bjarta framtíð, heldur Jørgin Pauli Johannessen.

Klokkan er farin at nærkast fimm seinnapartin. Vit eru komnir aftur til Havnar, og eg sigi honum farvæl. Enn er arbeiðsdagurin hjá Jørgini Paula Johannessen ikki liðugur.





*Framhald á næstu síðu >>*

*Formansfrágreiðingin:*

# Friðarligt í fiskiflotanum

**Í sáttmálahøpi hevur verið friðarligt í fiskiflotanum hetta seinasta árið – helst tí øll bíða eftir fiskivinnunýskipanini. Millum annað hetta staðfesti Páll Hansen í síni formansfrágreiðing á aðalfundinum 18. mars, sum vit her endurgeva redigerað brot úr. Týðandi evni eru viðgjørd í greinum fyri seg**

**TEKSTUR OG MYNDIR:**
INGOLF S. OLSEN
ingolf@press.fo

Semjan fyri fiskiskipini, sum bleiv gjørd millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag í 2015, varð hampiliga skjótt skrivað inn í sáttmálan. Striltið gekst tó við grein 17, sum umfatar frádráttir, men eg haldi, at vit komu á mál.

Maskinmeistarafelagið boðaði eisini í heyst Føroya Reiðarafelag frá, at vit vóru til reiðar at skriva undir. Samstundis boðaðu vit hinum manningarfeløgunum, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Fiskimannafelag, frá, at vit vildu leingja sáttmálan. Hetta vildu vit fyri at sleppa undan at hava samráðingar, meðan fiskivinnunýskipanin bleiv viðgjørd.



*Páll Hansen endaði sína formansrøðu við at heita á limirnar um longu nú at fara undir at brynja seg til formansvalið, sum verður næsta ár. Tí sjálvur stillar hann ikki upp aftur*

Tað dróg tó út at skriva undir nakra semju. Vit fregnaðust stutt fyri jól hjá Reiðarafelagn-





um um, hvat tað bleiv til, og svarið frá stjóranum var, at hann manglaði svar frá pørtum av sínum baklandi.

Beint fyri jól bleiv semja gjørd millum manningarfeløgini og reiðaríini Varðan, Framherja og Faroe Origin um fiskiskapin í ES-sjógvi og í norskum sjógvi fyri 2017.

Tíðliga í ár høvdu vit fund við formannin í Føroya Reiðarafelag og umboð fyri JFK, har vit vístu á, at avtalur eru gjørdar uttan um Maskinmeistarafelagið og Føroya Reiðarafelag, og at hesar kunnu skapa trupuleikar. Mótparturin ásannaði, at hetta var óheppið, og at hetta skuldi verða rætta. Eg loyvi mær at ivast í hesum.

Nøkur nýggj skip eru komin inn í flotan. Hetta fegnast við um og vóna, at vit fara at síggja fleiri.

Friðarligt hevur annars verið á hesum økinum síðsta ár, og hettar kemst helst av, at bíða verður eftir einari avgerð í málinum um nýskipan.

## Trygd og heilsa

Á sjómannadøgunum í Klaksvík helt Annbjørg á Høvdanum, vinnusálarfrøðingur, fyrilestur, har hon greiddi frá kanning, sum hon hevði gjørt um trygd á sjónum.

Maskinmeistarafelagið hevur saman við hinum manningarfeløgunum og Granskingarráðnum veitt stuðul til hesa kanning..

Í kjakinum aftaná varð millum annað komið inn á trygdarskeið og pensjónsaldur.

Maskinmeistarafelagið hevur hildið seg til tríggjar vikur trygdarskeið, sum tað var lagt

> ”Sum altíð var hýrurin góður á aðalfundinum, og kaffiprátini vóru nógv“

upp til, og tí vóru vit bilsin av viðgerðini, sum hetta mál fekk í miðlunum og av politikarum. Maskinmeistarafelagið hevur í áravís havt ta prinsipiellu støðu, at trygdin umborð á okkara fiskiskipum skal vera á sama støði sum á handilsskipum, har orðaðar mannagongdir eru um trygd, heilsu og umhvørvi, og har hesar mannagongdir javnan verða tiknar upp at venda umborð.

Vit fegnast um hesa kanning hjá Annbjørg og vóna, at hon heldur áfram, so vit fáa broytt hugburð um trygd, heilsu og umhvørvi á sjónum.

## Reiðarafelagið fyri Farmaskip

Sáttmálasamráðingar millum Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið fyri farmaskip og frálandaskip byrjaðu tann 19. januar, og eftir tríggjar samráðingarfundir komu partarnir til eina semju 20. februar.

Tilsamans hækka løn og eftirløn við ávikavist 2,2 prosentum fyrra árið og 2,3 prosentum seinna árið. Eftirlønin hækkar 1. mars 2017 úr 8 prosentum í 9 prosent og aftur 1. mars 2018 við einum prosenti upp í 10 prosent.

Lønarhækkingin er tann sama, sum feløgini á privata arbeiðsmarknaðinum hava fingið í hesum samráðingarumfarinum.

Generelt kann annars sigast, at talið av nýbygningum innan farmaskip og frálandaskip var sera lágt í 2016, og talan er um lægsta tal í 20 ár. Samstundis hevur prísurin á spottmarknaðinum hjá skipum í frálandavinnuni verið sera lágur, og hettar merkist – eisini hjá teimum føroysku reiðaríunum.

Vit hava tó samanumtikið sæð ein vøkstur hjá føroysku vinnuni hetta seinasta árið og fegnast um, at vinnan mennist so líðandi.

Maskinmeistarafelagið roynir eftir besta førimuni at arbeiða soleiðis, at skip undir føroyskum flaggi eru kappingarfør í mun til skip undir øðrum flaggi, sum tey kappast við.

Tó harmar tað okkum, at meirilutin av nevndarliminum í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip í dag eru umboðsmenn hjá útlendskum reiðaríum. Maskinmeistarafelagið og hini manningarfeløgini hava ikki samráðingarrættin við hesar útlendingar orsaka av, at Føroyar eru FOC-skrásettar – skrásettar sum hentleikaflagg. Okkurt av hesum útlendsku reiðaríum eru beinleiðis orsøkin til, at vit eru endað á FOC-listanum.

## Strandferðslan

Samráðingar millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið um nýggjan sáttmála fyri maskinmeistarar við Strandfaraskipum Landsins byrjaðu 5. oktober. Seks samráðingarumfør vóru, men 8. desember samdust partarnir um at boðsenda semingsmanninum. Semingin byrjaði 12. januar á Hotel Føroyum. Tað gekk væl, og longu dagin eftir var semja skrivað undir millum partarnar.

Talan er um ein eitt ára sáttmála galdandi frá 1. oktober 2016 til 1. oktober 2017.

Sáttmálin gevur somu lønarhækkan, sum onnur alment lønt fáa í sama tíðarskeiði - 1,9 prosent. Harumframt hækkar eftirlønargjaldið upp í 14,5 prosent.

Samanumtikið eru vit væl nøgd við semjuna.

## Sáttmálar á landi

Fyri tey alment løntu á landi, Magnus Heinason og Vørn ganga sáttmálarnir allir út 1.oktober.

Sáttmálin fyri maskinmeistarar hjá SEV og IRF gongur eisini út 1.oktober.

Í sambandi við at eldraøki bleiv lagt út til kommunurnar, blivu bygnaðarbroytingar framdar, og í hesum sambandi varð avtala gjørd við KAF (Kommunala Arbeiðsgevarafelagið) um maskinmeistarar/húsavørðar. Eg rokni við, at sáttmálaøkið við KAF fer at mennast nógv í framtíðini.

Síðst í mai í fjør bleiv semja gjørd millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Maskinmeistarafelagið.

Semjan hevði við sær eina lønarhækking á 2,2 prosent 1. juni í 2016 og 2,3 prosent 1. juni í ár umframt aðrar tillagingar í sáttmálanum. Semjan er sostatt á sama støði, sum semjan millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðarafeløgini.

## Lønarnevnd

Í oktober í fjør tók Kristina Háfoss, fíggjarmálaráðharri, stig til at seta eina lønarnevnd. Endamálið við nevndini er at hyggja eftir lønarskipanunum innan sáttmálaøkið hjá tí almenna, soleiðis at framtíðar lønarskipanir í størst møguligan mun tryggja gjøgnumskygni, samstundis sum skipanirnar eru tíðarhóskandi og stuðla undir framhaldandi menning av almenna geiranum.

Tað eru 29 fakfeløg sum hava avtalu við lønardeildina. Talan er um 32 lønarsáttmálar og yvir 100 sløg av viðbótum, so tað er gott, at stig verða tikin fram

Framhald á næstu síðu >>





ímóti eini nútímansgering á hesum øki.

Ein arbeiðsbólkur er síðan settur at gera hettar arbeiði, og er meiningin at hava eina partvís niðurstøðu, áðrenn komandi samráðingar.

## Keðilig støða í Noregi

Arbeiðsloysið millum maskinmeistarar í Skandinavia er sera lágt. Tó er støðan keðilig í Noregi. Um ársskiftið vóru 240 maskinmeistarar skrásettir sum arbeiðsleysir hjá norska felagnum. Somu tíð í fjørð vóru tað 200. Teir vænta, at hetta tal fer at vaksa spakuliga í 2017, og er hettar ómetaliga keðiligt.

Tað eru omanfyri 30.000 maskinmeistarar í Norðurlondum, og sæð í tí ljósinum er arbeiðsloysi millum maskinmeistarar sera lágt.

## Tryggingarfelagið LÍV

1. oktober var eftir drúgva tilgongd komið á mál við nýggju ognarviðurskiftunum hjá størsta pensjónsfelagnum í Føroyum LÍV. LÍV umsitur tveir triðingar av samlaðu føroysku pensjónunum og pensjónstryggingunum.

Felagið er nú ogn hjá tryggingartakarunum sjálvum og 17 av føroysku fakfeløgunum, harímillum Maskinmeistarafelagnum.

Hetta var formliga undirskrivað av avvarðandi pørtum á samkomu í LÍV 1. september 2016.

Hetta var stórur dagur hjá fakfeløgunum.

Ognarparturin hjá Maskinmeistarafelagnum í LÍV er umleið 5,5 prosent av tí partinum, sum P/F Fakfelag hevur keypt.

Fyrst í hesum árinum bleiv so skipað fyri vali til ognarfelagið, har 35 persónar skuldu veljast til umboðsráðið, og Maskinmeistarafelagið var so heppið, at vit fingu tveir nevndarlimir valdar í umboðsráðið.

## Útbúgving

Á útbúgvingarøkjunum henda fleiri broytingar í nærmastu framtíð.

Ein aspirantskipan fyri maskinmeistarar verður væntandi klár í august í ár.

Í aspirantskipanini verður sett sum krav fyri upptøku, at næmingarnir skulu hava miðnámsstøði í lærugreinunum matematikk og fysikk.

Í okkara grannalondunum eru hægri maritimar útbúgvingar á bachelorstøði, og í Føroyum eru og verða fleiri bachelorútbúgvingar.

Á Vinnuháskúlanum verður arbeitt við at fáa tær maritimu útbúgvingarnar á bachelorstøði, og talan verður um ein yvirbygnað á verandi skipan.

Sostatt heldur maskinmeistaraútbúgvingin fram sum nú á Vinnuháskúlanum, og eftirútbúgving/yvirbygnaður fer so fram í einum samstarvi millum Fróðskaparsetrið og Vinnuháskúlan.

Fyrireikandi arbeiði er í gongd og hevur verið tað eina tíð, so møguleiki til uppstiging í el- og maskinverkfrøði verður framd í verki.

Mett verður annars, at maritima útbúgvingarrøkinum vantar raðfesting í Mentamálaráðnum. Har er ikki nøktandi orka til taks til at taka sær av innihaldi í sjóvinnuútbúgvingunum.

Eisini eigur man at skipa fyri útbúgvingum innan shipping á handils- og miðnámsskúlunum, so vit við tíðini fáa størri vøkstur innan shipping her á landi.

## Skrivstovan

Tað dagliga arbeiðið á skrivstovuni gongur fyrimyndarliga gott. Felagið er væl fyri fíggjarliga, og roknskapurin er góður. Tað legst til við limum, og vit eru í dag tilsamans 679 limir harav 548 virknir.

Eisini síggja vit, at talið av sakarmálum og øðrum trætumálum er lækkandi. Í dag er tað soleiðis, at blivur man varugur við onkrar smávegis trupulleikar, so verða hesir sum oftast loystir við samrøðum millum partarnar.

Onkursvegna eru vit øll vorðin dugnaligari til at loysa trupulleikar, tá teir uppstanda.

*Les í næsta blað:*
***Í síni formansrøðu fanst Páll Hansen at ymiskum viðvíkjandi Sjóvinnustýrinum/FAS, millum annað, at myndugleikin í fleiri førum slakar upp á krøv fyri at ganga ávísum reiðaríum og handilsskipabólkum á møti og fyri bara lata standa til í FOC-spurninginum.***

***Grein um hetta verður í næstu útgávu av Maskinmeistaranum.***





www.fma.fo • fma@fma.fo • tel 35 56 00
SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY



KSS ER UMBOÐ FYRI IBERCISA Í FØROYUM, DANMARK, GRØNLANDI, SVØRÍKI, ONGLANDI, SKOTLANDI, ÍRLANDI, ÍSLANDI OG NORRA.

FLEIRI FYRIMUNIR,
LÆGRI KOSTNAÐUR

Eldrivnu spølini frá Ibercisa eru at finna umborð á yvir 120 trolarum kring heimin. Spølini hava fingið avbera góð ummæli. Spølini hava minni tørv á orku, og eru harvið bíligari í rakstri og meira umhvørvisvinarlig.






Ynskir tú at hoyra meira um eldrivnu spølini? Set teg í samband við okkum.
+298 472030
KSS@KSS.FO
WWW.KSS.FO
KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

Framhald á næstu síðu >>

*Fiskivinnunýskipan:*

# Ymiskar meiningar

**Eisini fisikivinnunýskipanin varð viðgjørd á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum. Formaðurin hevur onki prinsipielt ímóti uppboðssølu, men flestu nevndarlimirnir eru ímóti**

TEKSTUR OG MYNDIR:
INGOLF S. OLSEN
ingolf@press.fo

Fiskivinnunýskipanin fekk rúm í formansrøðuni og var eisini viðgjørd í kjakinum á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum.

Í formansfrágreiðingini fegnaðist Páll Hansen um, at dentur verður lagdur á stovnsrøkt í uppskotinum til fiskivinnunýskipan, at manningar skulu lønast sambært sáttmálum við føroysku manningarfeløgini, og at útlendingar umborð á føroyskum fiskiskipum skulu hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi og skattskyldu í Føroyum.

– Høvuðstrupulleikin í uppskotinum hevur verið at røkka einari breiðari politiskari semju. Sum kunnugt, so bar ikki á mál við tí. Vit kunnu bert vóna, at tað verða funnar politiskir semjur í løgtingssalinum, segði hann í síni røðu.

## Uppboðssøla

Men tá kjakið varð givið leyst undir punktinum „ymiskt“, varð komið inn á veruliga knútin í nýskipanini, nevniliga útlutingina, har uppboðssøla eisini er ein partur.

Ein limur vildi hava at vita, um Pál Hansen hevði úttalað seg egna vegna ella vegna felagið, tá hann alment hevði sagt seg stuðla uppboðssølu av fiskirættingum.

Páll Hansen greiddi frá, at hann hevði tikið undir við royndaruppboðssøluni, og tað stóð hann við.

Eisini vísti hann á trupulleikan, sum í dag er við at fáa atgongd at fiska, og tí helt hann tað vera skilagott, um til dømis loyvi og kvotur, sum verða drigin inn, tí brúksskyldan ikki verður hildin, verða seld á uppboði.

Páll Hansen legði dent á, at ymiskar meiningar eru í nevndini um fleiri tættir í uppskotinum til fiskivinnunýskipan og staðfesti, at viðvíkjandi uppboðssølu av rættindum eru fleiri ímóti.

Hann vísir á, at hóast ymiskar meiningar kunnu vera, so hevur nevndin altíð lagt dent á at viðgera øll mál og at svara øllum hoyringsskrivum, sum hon fær.

– Tað hevur borið til higartil, so tað fer eisini at bera til frameftir, sigur formaðurin.



*Teir bíða í spenningi, meðan talt verður upp. Úr vinstru eru tað Páll Hansen, Regin Olsen, John Højsted og Jóan Petur Patursson. Regin Olsen bleiv afturvaldur*

# Hans Ingvard nýggjur í nevndini

**Dystur var um nevndarsessirnar á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum. Hans Ingvard Joensen vann sessin frá Jóhan Weihe**

TEKSTUR OG MYNDIR:
INGOLF S. OLSEN
ingolf@press.fo

Dystarval er ikki óvanligt í Maskinmeistarafelagnum, og eisini í ár gjørdist nevndarvalið spennandi. Regin Olsen og Jóhan Weihe vóru upp á val hesaferð, og stillaðu teir báðir uppaftur.

Men tvey onnur valevni vóru eisini í uppskoti, Jóhan Mørkøre og Hans Ingvard Joensen, og tá avtornaði hevði Hans Ingvard Joensen fingið flest atkvøður – 19 – og Regin Olsen fekk næstflest við sínum 18 atkvøðum og var sostatt afturvaldur.

Hvørki Hans Ingvard Joensen ella Jóhan Weihe vóru til staðar á aðalfundinum, tí teir vóru umborð.

Spenningur var eisini, tá tveir varalimir skuldu veljast. Tríggir vóru í uppskoti, Jóhan Weihe, Jóhan Mørkøre og Pætur Rein Jensen. Jóhan Weihe var fyrstvaldur við 24 atkvøðum, men tað stóð á jøvnum 18-18 millum Jóhan Mørkøre og Pætur Rein Jensen. Tí mátti lutakast vera, og tá vann Jóhan Mørkøre.

Nevndin, sum skipaði seg á fyrsta fundinum eftir aðalfundin, sær nú soleiðis út:

Páll Hansen, formaður, Regin Olsen, næstformaður, John Højsted, nevndarlimur, Jóan Petur Patursson, nevndarlimur, og Hans Ingvard Joensen, nevndarlimur. Varalimir: Jóhan Weihe og Jóhan Mørkøre.



*Hans Ingvard Joensen var umborð á Jupiter, men megnaði kortini at vinna sær sess í nevndini í Maskinmeistarafelagnum*



*Jóhan Mørkøre vann við lutakasti annan sessin sum varalimur*



*Jóhan Weihe var ov stuttur til ein nevndarsess á hesum sinni, men var fyrstvaldur sum varalimur*

# Limagjaldið lækkað

**Maskinmeistarafelagið er væl fyri fíggjarliga. So væl, at nevndin á aðalfundinum hevði eitt uppskot um at lækka limagjaldið úr 1,1 prosenti niður í 1,0 prosent. Hetta varð einmælt samtykt**

**TEKSTUR:**
INGOLF S. OLSEN
ingolf@press.fo

Limatalið í Maskinmeistarafelagnum veksur, og í fjør komu 3,2 milliónir krónur inn í limagjaldi ímóti 2,8 milliónum krónum í 2015.

Úrslitið í fjør var 742.000 krónur ímóti 606.000 krónum í 2015. Javnin var 7,9 milliónir krónur, og Maskinmeistarafelagið hevði um ársskiftið 5,2 milliónir krónur í tøkum peningi. Eisini Stuðulsgrunnurin hjá felagnum, sum millum annað eisini virkar sum verkfalsgrunnur, er væl fyri. Tann roknskapurin er ikki almennur.

Hetta var annað árið á rað, at limagjaldið hjá Maskinmeistarafelagnum lækkaði. Á aðalfundinum í fjør fór tað úr 1,2 prosentum niður í 1,1 prosent, og í ár lendi tað sum nevnt á 1,0 prosenti.





SKEIÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM

VINNUHÁSKÚLIN

- BRM-skeið
- ERM-skeið
- Ship Handling
- Skeið í heilsulæru og endurnýggjan
- ARPA-skeið
- ECDIS-skeið
- Tecdis-skeið
- SSO-skeið
- § 16-skeið
- ISPS-skeið
- Endurnýggjan av vinnubrøvum
- Tankers Safety-skeið
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Ketilpassaraskeið
- GMDSS-skeið
- LRC-skeið
- GOC-skeið og endurnýggjan
- DP Basic/induction
- DP Advanced/Simulator
- DP endurnýggjan
- AIS
- Tankers familiarisation
- Háspenningsskeið maskinmeistarar
- Háspenningsskeið maskinistar

TRYGDARDEPILIN VIÐ ÁIR

- Eldsløkking umborð á skipi
- Endurtøkuskeið eldsløkking u.s.
- Sløkkileiðsla umborð á skipi
- Eldsløkking fyri skipsyvirmenn
- Endurtøka IMO 80
- Trygdarskeið grundleggjandi
- Trygdarskeið fult
- FRC-grundskeið
- Bátaføraraskeið
- Medisinsk fyrstahjálp
- Stroppaskeið

Skeiðini eru sambært STCW-sáttmálanum við broytingum frá 2010.
Koturnar til skeiðini finnast á heimasíðu skúlans.

SENDISTOVAN

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING



*Karin Mikkelsen hevur barnsburðarfarloyvi og kundi tí møta upp á aðalfundinum sum hin fyrsta kvinnan í søguni hjá Maskinmeistarafelagnum*

# Fyrsta kvinna á aðalfundi

**Fyri fyrstu ferð í søgu felagsins var ein kvinna á aðalfundi hjá Maskinmeistarafelagnum. Karin Mikkelsen trívist væl í fakinum, tó at tað enn er ein mannaheimur**

**TEKSTUR OG MYNDIR:**
INGOLF S. OLSEN
ingolf@press.fo

Javnstøða vinnur alt meira fram í okkara parti av heiminum, men tó at bæði kynini bæði rættarliga og í sáttmálum eru tryggjað somu kor og sømdir á arbeiðsmarknaðinum, so er kynsbýtið enn sera ójavnt innan summi fak. Eitt nú innan maskinmeistarafakið.

Onkur kvinna hevði lokið maskinmeistaraprógv á Vinnuháskúlanum, áðrenn Karin Mikkelsen úr Sørvági fekk sítt prógv haðani í desember 2011, og onkur hevur eisini fingið prógv síðani.

Men langt er ímillum tær, og tá Karin Mikkelsen troppaði upp á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum hesaferð, var tað fyrstu ferð í søgu felagsins, at ein kvinna var á aðalfundi.

Karin siglir sum 2. meistari við frálandaskipinum Stril Merkur hjá norska reiðarínum Simon Møkster Shipping.

– Mær dámar væl og eri altíð vorðin viðfarin á jøvnum føti við hini umborð – tað gongur sjálvsagt báðar vegir. Ein onnur kvinna byrjaði í reiðarínum, men gavst aftur, og eg havi fult forstáilsi fyri kvinnum, ið ikki vilja júst hettar. Eg haldi ikki, at javnstøða merkir, at kvinnur endiliga skulu vera allastaðni, men at til dømis vit, sum ynskja at sigla sum maskinmeistarar, hava møguleikan til tað, sigur Karin Mikkelsen.

Hon er nú í barnsburðarfarloyvi úr starvi sínum sum siglandi maskinmeistari.





# 19 maskinistar fingu prógv

**Maskinistar eru grundsúlan í maskinrúminum á føroysku fiskiskipunum, segði næstformaðurin í Maskinmeistarafelagnum millum annað í røðu síni**

**TEKSTUR:**
INGOLF S. OLSEN
ingolf@press.fo
**MYNDIR:**
ERLAND HENTZE RASMUSSEN

13. mars fingu 19 maskinistar prógv á Vinnuháskúlanum. Sum vanligt hendi hettar á hugnaligari samkomu á skúlanum, har avvarðandi hjá nýklaktu maskinistunum eisini vóru við.

Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum, beyð vælkomin og helt vælkomstrøðu. Eftir sjálva prógvhandanina helt Regin Olsen, næstformaður í Maskinmeistarafelagnum, røðu vegna felagið.

Hann ynskti maskinistunum og teirra avvarandi tillukku við prógvunum og segði í røðuni millum annað, at maskinistar eru grundsúlan í maskinrúminum á føroysku fiskiskipunum og á farmaskipum upp til 3000 kW.

Síðani tók Regin Olsen



**”Regin Olsen, næstformaður í Maskinmeistarafelagnum, eggjaði millum annað nýggju maskinistunum til at fylgja væl við innan økið, tí menning og broytingar henda so skjótt.“**

aftur í aftur brot úr røðuni, sum maskinskúlalærarin Finnur Johannesen sáli hevði hildið til sína egnu prógvhandan í 1983:

„Tað vera størri motorar, ið tit sleppa at passa enn tann, ið stóð í sluppini Elin á sinni. Teir vóru á Suðurlandinum og høvdu fingið uppí, gott lag var á monnum, altíð spennandi at gera klárt at sigla heim. Tað var sera góður byrur, so øll segl vóru sett fyri, og full kraft sett á maskinuna, teir vildu gera skjótt av at koma heim til síni kæru. Tá ið Elin kom inn á Vágsfjørð, og seglføringin bleiv lækkað, funnu teir út av, at maskinan hevði staði bakk allan veg heim.“

## Stór ábyrgd

Regin Olsen røddi eisini um, hvussu nógvar ymiskar arbeiðsuppgávur liggja á siglandi maskinfólki í dag og eggjaði nýggju maskinistunum til alla tíðina at vera forvitnir og fylgja við, hvat hendir á økinum, tí menningin er stór, og alt broytist so skjótt.

– Tað eru fá, sum geva sær far um, hvussu nógv skal til fyri at fáa eitt skip at sigla fram. Høvuðsmotorurin er bara eitt. Sum oftast eru tað tveir ella



*Maskinistar mars 2017: Petur Arni Mortensen, Torkil Beder Thomsen, Adrian Ólason Johannesen, Áki Breyt Hermansen, Árni Jacobsen Tausen, Bergur Mortensen, Bergur Sørensen, Dávur Beder, Eilif Jóhan Hans Samuelsen, Eystein Cornette, Heini Magnussen, Henning Lamhauge, Ingi Mohr, Kenneth Gaardlykke, Sámal Johannesen, Sigmundur Martinsson Jacobsen, Símun Andrias Lamhauge, Søren Hjarbæk Jensen og Kjartan Johansen. Virðislønir: 1. Kenneth Gaardlykke, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum. 2. Søren Hjarbæk Jensen, kikara frá Betri Banka. 3. Bergur Sørensen, lummaur frá Anteres*

tríggir hjálpimotorar og egið elverk umborð, segði hann.

Næstformaðurin í Maskinmeistarafelagnum staðfesti eisini, at føroyskir maskinistar og maskinmeistarar sum heild hava eitt gott umdømi, bæði nasjonalt og internasjonalt.

– Tað er týdningarmikið at varðveita góða umdømið og leggja til eftir evnum. Tit kunnu nú velja, um tit skulu arbeiða á heimligum leiðum ella fara longur út í heim, men við hesum møguleika fylgir eisini ábyrgd. Men útgangsstøðið hjá tykkum er gott. Tað maritima arbeiðsøkið er eitt sera spennandi øki at fáa loyvi at arbeiða á, segði Regin Olsen.



*Nógv avvarðandi tóku lut í hátíðarhaldinum á Vinnuháskúlanum. Her lýða tey á vælkomstrøðuna hjá Wilhelm Petersen, stjóra á Vinnuháskúlanum*





*Framhald á næstu síðu >>*

# Maskinmeistaraútbúgving við nýggjari aspirantskipan

**Í summar verður spildurnýggj aspirantskipan ætlandi sett í verk á Vinnuháskúlanum. Talan er um aspirantskipan á útbúgvingini hjá maskinmeistarum**

**TEKSTUR OG MYNDIR:**
GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN
grakaris@press.fo




Í gott og væl eitt ár hevur verið arbeitt við at fáa eini aspirantskipan til maskinmeistaranæmingar á Vinnuháskúlanum. Nú er komið so mikið áleiðis, at

> **”Vinnan á sjógvi og landi dámar væl nýggju aspirantskipanina fyri maskinmeistaranæmingar, sigur stjórin á Vinnuháskúlanum, Wilhelm E. Petersen.“**

skipanin ætlandi verður sett í verk í summar. Frammanundan hevur ein skipan við aspirantum fyri navigatørnæmingar á Vinnuháskúlanum verið roynd í eina tíð við góðum úrslitum.

Skipanin fyri maskinmeistaraaspirantar verður løgd soleiðis til rættis, at byrjað verður á verkstaðsskúla í eitt ár, um næmingurin ikki frammanundan hevur eina handverkaraútbúgving. Verkstaðsskúlin verður á Glasir, men Vinnuháskúlin hevur ábyrgdina av útbúgvingini.

## Starvsvenjing og sigling

Tá næmingar hava tikið verkstaðsskúla, fara teir eitt ár í starvsvenjing. Helvtin av starvsvenjingini, tað eru seks mánaðir, skulu takast umborð á skipi, restin verður tikin á arbeiðsplássi á landi, sum væl at merkja er viðkomandi fyri



*Nýggja aspirantskipanin gevur næmingunum møguleika at fáa siglingstíð sum part av sjálvari útbúgvingini*

maskinmeistarar. Eftir loknan verkstaðsskúla og loknað starvsvenjing fara næmingarnir víðari á vanligu ástøðiligu útbúgvingina.

Enn er endalig avgerð kortini ikki tikin um starvsvenjingina. Tað kann vera, at árið við starvsvenjing verður býtt upp í tvey, tað er, at seinna helvtin av starvsvenjingini verður tikin seinni í útbúgvingini.

– Á tann hátt kann næmingurin hava nakað av teori við, tá hann fer í starvsvenjing seinnu ferð, sigur Wilhelm E. Petersen.

## Vinnan er jalig

Stjórin á Vinnuháskúlanum, Wilhelm E. Petersen, sigur, at skúlin hevur verið í samband við reiðaravirkir – og við arbeiðspláss á landi um ávikavist siglingstíð og starvsvenjing, og her tykist hugburðurin vera rættiliga jaligur.

– Allir partar duga at síggja fyrimunirnar við einari slíkari skipan, sigur hann.

Frammanundan hevur tað mangan verið ein trupulleiki, tá næmingar hava tikið endaligt prógv sum maskinmeistarar, at teir lítla ella onga siglingstíð hava havt.

– Við hesi skipanini fáa næmingarnir neyðugu seks mánaðirnar í siglingstíð sum part av sjálvari útbúgvingini, og tað er ein stórur fyrimunur, heldur stjórin á Vinnuháskúlanum.

Enn eru nøkur viðurskifti eftir, sum skulu koma upp á pláss. Endalig avtala skal gerast um starvsvenjing á virkjum á landi, og endalig avtala skal eisini gerast við reiðaravirkir.

– Haraftrat skulu vit eisini koma á mál við einari endaligari avtalu við Glasir, men har eru tey spent at gerast ein partur av hesari útbúgvingini, sigur Wilhelm E. Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum.








## Føðingardagar Maskinmeistarafelagið:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sjúrður Samuelsen | Vágur | 8/5-1947 | 70 ár |
| Tummas Løkjá | Sandur | 24/5-1947 | 70 ár |
| Hans S. Djurholm | Tórshavn | 2/6-1947 | 70 ár |
| Jógvan Hammer | Strendur | 27/6-1947 | 70 ár |
| Úlvur við Høgadalsá | Tórshavn | 29/6-1947 | 70 ár |
| Kristian Thorleifsson | Tórshavn | 22/4-1957 | 60 ár |
| Rólant Isaksen | Vestmanna | 1/5-1957 | 60 ár |
| Kaj Joensen | Vágur | 4/5-1957 | 60 ár |
| Odmar Næs Nattestad | Tórshavn | 23/5-1957 | 60 ár |
| Mervin Egholm | Hoyvík | 1/6-1957 | 60 ár |
| Dávid Jacobsen | Norðragøta | 25/6-1957 | 60 ár |
| Hallur Andreassen | Tórshavn | 2/7-1957 | 60 ár |
| Erhard Justinussen | Gøtueiði | 13/7-1957 | 60 ár |
| Jógvan Magnusson Joensen | Saksun | 15/7-1957 | 60 ár |
| Jóhan Hentze | Hoyvík | 5/3-1967 | 50 ár |
| Árni Vilhelm | Tvøroyri | 8/5-1967 | 50 ár |
| Jákup Pauli Marsten | Klaksvík | 16/5-1967 | 50 ár |
| Alén Eli Viderø | Tvøroyri | 20/5-1967 | 50 ár |
| Eirik Joensen | Oyndarfjørður | 22/5-1967 | 50 ár |
| Hákun Thomsen | Argir | 17/6-1967 | 50 ár |
| Olivar Nolsø | Argir | 18/6-1967 | 50 ár |
| Edmund Hansen | Fuglafjørður | 22/6-1967 | 50 ár |
| André Magnussen | Norðragøta | 31/7-1967 | 50 ár |
| Jens Olivur Erlingsson | Hvalba | 29/6-1977 | 40 ár |
| Torkil M. Jacobsen | Klaksvík | 1/7-1977 | 40 ár |
| Jóhannus Johannesen | Tórshavn | 9/4-1987 | 30 ár |
| Jan Poulsen | Syðrugøta | 14/5-1987 | 30 ár |
| Jógvan Jacobsen | Hoyvík | 4/6-1987 | 30 ár |
| Hanus Holm Stórhamar | Hoyvík | 10/6-1987 | 30 ár |
| Bjartur í Lágabø | Vágur | 21/6-1987 | 30 ár |
| Høgni Olsen | Argir | 20/7-1987 | 30 ár |
| Benjamin Mikladal | Klaksvík | 22/7-1987 | 30 ár |





# Frá Maskinmeistarafelagnum

**19-01-2017 MF**
Forfundur. Nevndin møttist at viðgera krøvini frá RfF, nú sáttmálasamráðingar byrja.

**26-0-2017 Vinnuhúsið**
Fyrsti samráðingarfundur millum MF og RfF. Báðir partar løgdu síni krøv fram, og gjøgnumgingu tey.

**31-01-2017 MF**
Fundur við Einfalt um endurskoðan og dagføring av okkara heimasíðu.

**31-01-2017 Fiskimálaráðið**
**Fyrrapartin:** Manningarfeløgini og umboð fyri arbeiðarafeløg fingu kunning frá Høgna Hoydal um tilgongdina innan fiskivinnunýskipanina.
**Seinnapartin:** 2. fundur millum MF og RfF, har partarnir komu nærri inná ynskini hjá hvørjum øðrum.

**01-02-2017 FSN**
MF og FSN. Fundur millum formenninar í báðum feløgunum um felagsstev, har hetta er gjørligt millum partarnar. o.a.

**06-02-2017 FSN**
Manningarfeløgini fund við manningina á Vesturland um ymiskar spurningar í samband við, at skipið er vorðið vrak.

**07-02-2017 Smyril**
Fund við teir meistararnar, sum vóru á vakt umborð – um komandi dokkavtalu.

**15-02-2017 Smyril**
Fund við hitt liðið av meistarum umborð á Smyrli um komandi dokkavtalu.

**17-02-2017 MF**
Nevndarfundur. Trý mál vóru til kunning, millum annað nýskipan av fiskivinnuni.
Til støðutakan vóru 7 mál á skránni, millum annað samráðingarnar við farmaskip og frálandaskip. Tosað varð eisini um komandi aðalfund. Samtykt varð at halda fram við blaðúgávu o.a.

**20-02-2017 Vinnuhúsið**
Samráðingarfundur við RfF um avtalu við farmaskip og skip í frálandavinnuni. Fundurin endaði við semju millum partarnar.

**22-02-2017 Smyril**
Fund við teir meistararnar, sum vóru á vakt umborð, um komandi dokkavtalu.

**23 02-2017 MF**
Fundur við Press um blaðútgávu, nú FSN ikki er við meir.

**24-02-2017 Smyril**
Fund við meistararnar, sum vóru á vakt umborð, um dokkavtalu.

**27-02-2017 MF**
Fundur við Páll Nielsen um ymisk viðurskifti viðvíkjandi dokkavtalu við SSL.

**03-03-2017 MF**
Nevndarfundur. Til viðgerðar var roknskapur, mál til aðalfundin, eftirløn útgoldið saman við lønini. Dokkavtala í samband við Smyril o.a.

**08-03-2017 S&K-felagið**
Nevndarfundur í P/F Fakfelag. Á skránni millum annað ásetan av degi fyri aðalfund hjá F/F fakfelag. Kunning av býti millum feløgini, nú vit eru blivin til 19 í felagnum.

**09-03-2017 Farstøðin**
Fundur millum umboð fyri SSL og MF um dokkavtalu.

**14-03-2017 Press**
Fundur við Press um komandi útgávu av Maskinmeistaranum. Innihald og annað.

**16-03-2017 Trygdargrunnurin**
Stýrisfundur. Á skránni var roknskapur 2016 og fíggjarætlan 2017 og annað.

**18-03-2017 Hafnia**
Aðalfundur.

**22-03-2017 S&K-felagið**
Nevndin í P/F Fakfelag hevði fyrireikandi fund, áðrenn aðalfundin í P/F Fakfelag.

**23-03-2017 Smæran**
Aðalfundur hjá P/f Fakfelag. Flestu feløg vóru møtt, og nevndarformaðurin gav eina frásøgn frá virki felagsins í farna ári. Roknskapur varð lagdur fram og góðkendur. Nýggj feløg vóru boðin hjartaliga vælkomin. Beint eftir fundin varð nevndarfundur hildin, har nevndin skipaði seg við Óluvu í Gong sum stjóra. Pætur Niclasen heldur fram sum nevndarformaður.

**03-04-2017 MF**
Stuttur nevndarfundur. Nýggja nevndin var samlað at velja næstformann og býta málsøkir.




# Lat okkum hjálpa tær at seta saman fíggjarliga trygdarnetið, so hongur tað ikki á tær

Kundin eigur LÍV. Vinningurin verður borin aftur gjøgnum góðar tryggingar, lágan rakstrarkostnað og eitt munagott avkast á pensjónsuppsparingini.

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo